ÚTSØLAN ER BYRJAÐ 25. JULI
OPIÐ ER TIL KL. 20.00
øll útsøluvøran 1/2 PRÍS
Menn & kvinnur – dreingir & gentur
GERIÐ EITT RÆTTULIGT HÁL
(tit menn; jakkar upp til str. 58 og jeans upp til str. 44)
Tórshavn
[TEIR] & [TARA] /// [ TARA ] & Jungmann – B&C
Salatangará

# Brúðarpar avlýsti ferð

**Ein nýgift føroysk hjún høvdu lagt ætlanir um at vitja kenda frítíðarbýin Sharm el-Sheikhh seinni í hesum mánaðinum. Eftir ógvusligu hendingarnar í nátt hava tey avlýst hesa brúðarferðina.**

Terror
*Snorri Brend*

Hesi bæði høvdu keypt sær eina ferð til Sharm el-Sheikh gjøgnum eina av ferðaskrivstovunum hjá Fonn Flog í Føroyum.

Ferðin varð keypt umvegis danska felagið Atlantis Rejser, sum hevur sum sergrein at flyta ferðafólk til Egyptalands, Reyða Havið og sum haraftrat skipar fyri ymiskum mentanaferum og kavaraferðum.

Seinnapartin leygardagin varð Leivur Fonn, stjóri á Fonn Flog uppringdur frá Atlantis Rejser, har sagt varð at hetta parið fekk allar pengarnar aftur.

Sagt varð í sama viðfangi, at Atlantis hevur um 600 ferðandi har í løtuni, og at øll teirra høvdu fingið tilboð um at verða flogin heimaftur.

Umframt Atlantis hevur eisini ferðaskrivstovan Apolli Sharm el-Sheikh sum eitt av ferðamálum sínum í Egyptalandi.



*Nógv er gjørt fyri at ferðafólkini skulu kenna seg væl til passar í Sharm el-Sheikh. Á mangar mátar er býurin ikki ólíkur einum vesturlendskum býi*

# Føroyingar sluppu ikki til bumbustaðið

**Um vikuskiftið hava donsku ferðaskrivstovurnar havt úr at gera við at flyta øll síni ferðafólk úr Sharm el-Sheikh.**

TERROR
*Snorri Brend*

Hóast tað kann tykjast ov heitt fyri føroyingar at vitja í Egyptalandi hesa ársins tíð, so eru tað kortini fleiri sum júst høvdu sett sær hetta landið sum feriumál í summar.

Leygarmorgunin frættist um eina føroyska kvinnu, sum var í atsøkta býnum saman við manni og børnum. Hóast nakað sjokerað, so høvdu tey fýra tað øll gott, fingu vit upplýst tann dagin.

Somuleiðis vita vit frá einum nýgiftum pari, sum somuleiðis ætlaði sær hagar á brúðarferð í næstu viku. Men tann ferðin má so broytast til eitt annað og meiri trygt stað.

Hinvegin so verður upplýst frá føroysku ferðaskrivstovuni Fonn Flog, at tey eisini høvdu onnur fólk, sum eftir ætlan skuldu fara avstað hagar fyrst í august mánaði.

Men frá Atlantis Rejser í Danmark, sum Fonn Flog samstarvar við, hava tey nú fingið at vita, at tey senda eingi fólk til Sharm el-Sheikh enn á sinni.

Atlantis Rejser vóru sunnudagin og í gjár fult upptikin við at fáa allar teir hundraðtals danarnir aftur til flogvallirnar í Billund og Keypmannahavn.

Henda ferðaskrivstovan hevur eisini avlýst allar avstaðferðir sínar til Egyptalands í góða tíð framyvir, og væntar ikki at flogið verður aftur hagar fyrrenn miðskeiðis í september mánaði.



*Tommy Petersen býr í Kairo, har tey eisini hava merkt til bumbuspreingingarnar í Sharm el-Sheikh*

# - Styrkt vaktarhald í Kairo

**- Hóast nógvir kilometrar eru millum Sharm el-Sheik og Kairo, so er býarlívið her eisini merkt av bumbunum í nátt, sigur føroyingurin, Tommy Petersen, sum býr egyptiska høvuðsstaðnum. Leygarmorgunin var allur býurin merktur av hendingini.**

Terror
*Snorri Brend*

- Enn veit eingin, hvør skipaði fyri atsóknini í Sharm el-Sheik. Tað plaga at ganga einar 24 tímar til hetta er greitt, so vit mugu bara bíða eftir tí svarinum.

- Onkur hevur nevnt, at tað er sama rørslan sum legði bumburnar í London. Men tað er ikki váttað enn, segði Tommy Petersen við Sosialin fyrrapartin leygardagin, tá vit høvdu hann í telefonini í heimi sínum í egyptiska høvuðsstaðnum.

Hann var sjálvur í Sharm el-Sheik á nýggjárinum og ferðaðist har. Hann búði tá á einum hotelli, sum liggur nærhendis við staðið har ein av bumbunum brast í nátt. Og hann vitjaði eisini í basarinum, har ein onnur bumba gjørdi stóran skaða.

**Vegforðingar**

Í Kairo eru fólk sum vera man somuleiðis merkt av hendingini í nátt. Eisini tey, sum búgva í býarpartinum, har Tommy Petersen býr.

Nakrar fáar hundrað metrar – kanska ikki meiri enn 300 metrar - frá heimi hansara býr ein ísraelskur sendimaður. Tá slík álop verða framd, verða beinanvegin tiltøk sett í verk í økinum.

Leygarmorgunin – bert fáar tímar eftir ógvusligu spreinginrarnar – var nakað av løgreglu í gøtunum, eisini í grannalagi hansara. Har vórðu tí fleiri vegforðingar settar upp uttanfyri húsini hjá hesum ísraelittinum, eins og meiri løgregla er at síggja í gøtunum nú í morgun.

- Men tað var kortini ikki talan um nakran dramatikk, sigur Tommy Petersen.

Hóast langt av landi skotin, so fylgir hann kortini væl við í tí sum hendir í Føroyum og Danmark. Vanliga fer hann inn á Alnetið fyrst á morgni fyri at lesa netútgávurnar hjá donsku bløðunum.

Leygarmorgunin sá hann kortini fyrstu tíðindini um bumburnar í Sharm el-Sheik á heimasíðuni hjá eini amerikanskari sjónvarpsstøð.

Síðani hevur hann fylgt væl við á teimum donskum heimasíðunum.




## Fakta

**Sharm el-Sheikh**

Býurin er tann best umtókti ferðavinnubýurin í Egyptalandi. Býurin liggur á sunnasta nesinum á Sinai-hálvoynni. Har eru luksushotell í hópatali og frálíkar strendur.

Býurin er eisini vakur undir sjóvarmálanum, har korallir og fiskur í túsundatali eru at síggja. Fer ein longur út á hav – við báti! - ber til at fáa eygu á bæði háv og delfinir.

Í býnum búgva um 30.000 fólk. Av flogvøllinum eru bert einir 10 min. í bili til nærmastu hotellini.